## DAGSINS MEINING

# Kappingarførið

Í gjár viðgjørdu vit her í oddagreinini tey sera áhugaverdu sjónarmið, sum Leif Høj, fiskaútflytari setti fram í viðtalu við Sosialin. Viðkomandi vísti á teir truplu flutningsmøguleikarnar sum eina høvuðsorsøk til, at fiskaprísirnir ikki eru so høgir, sum teir annars kundu verið

Útflytarin samanber støðuna í Føroyum við Ísland, har tað oftast ber til at hava tey fesku fløkini á marknaðinum 24 tímar ella 48 tímar eftir, at fiskurin er avreiddur. Hetta gevur íslendingum ein sera stóran kappingarfyrimun, tí keyparin er sinnaður at rinda fleiri krónur eyka fyri kilo av daggomlu fløkunum. Útflytarin sigur, at eitt tað størsta framstigið fyri kappingarførið í Føroyum vildi verið at fingið so góðar flutningsmøguleikar, at tíðin frá tí, at fiskurin verður avreiddur, til hann er keyparanum í hendi, verður munandi stytt. Møguleikarnir fyri at føroyingar kunnu útflyta fesk fløk við flogfari ella við skjóttgangandi skipi eiga tí at verða kannaðir.

Heilt ítøkiliga mælir nevndi útflytari til, at bæði vinnan og landið verða við í eini ætlan, sum hevur til endamáls at tryggja okkum betri flutningsmøguleikar. Vit loyvdu okkum í gjár at gera vart við, at her er talan um eitt vinnuligt vandamál, sum bert kann verða loyst politiskt. Tað er eitt sera áhugavert hugskot, at vinnan og landið í felag sum skjótast fóru undir at loysa hetta vandamál. Slík model eru sera vanlig í okkara grannalondum, og hetta er helst tað besta hitt almenna kann gera til tess at hjálpa tí hart kroystu vinnuni, samstundis sum forðað verður fyri størri arbeiðsloysi.

Annað, sum er sera áhugavert í nevndu blaðsamrøðu er, at útflytarin heldur, at tað er skeivt at geva tímalønunum skyldina fyri, at kappingarførið hjá føroysku fiskivinnuni á landi er so vánaligt. Víst var á, at tað, sum hevur eina størstan týdningin fyri kappingarførið er, at vit fáa betri flutningsmøguleikar til útheimin. Tað eigur tískil at verða hildið uppat við einvíst at skylda uppá tímalønina, tá kappingarførið í fiskivinnuni á landi verður umrøtt. Føroya Arbeiðarafelag átti at tikið hendan táttin upp og stuðla kravinum um nógv betri flutningsmøguleikar. FA hevur tørv á, at fokus verður flutt frá tímalønunum. Útflytararnir hava brúk fyri øllum tí politiska stuðli, teir kunnu fáa til tess at fá bøtt um støðuna, og FA kann ivaleyst at ásannað, at nógv arbeiðspláss eru innan virksemisøkið fyri útflutningi av feskum fløkum. Fyri FA er ræður um, at allur fiskur kemur og fer um føroyskan keikant. Her hava allir partar nógv at vinna.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerkingar til Lotte Mejlhede

**Óli Jacobsen**



Fyribils hava vit hesar viðmerkingar til tað, sum varatíðindaleiðarin á TV2 segði við útvarpið í gjár.

TV2 hevur ongantíð vent sær til FF í aktuella málinum. Um teir høvdu gjørt tað høvdu vit ikki sagt, at okkara hýrutøl fyri 2003 ikki vóru tøk. Vit høvdu fyribils tøl longu við árslok og endalig tøl fyri flestu veiðubólkar ein mánaða aftaná. Um vit vóru spurdir, høvdu vit kunnað latið teimum tølini við frágreiðing á donskum.

Tískil hava vit heldur ikki víst TV2 til okkara heimasíðu. Vit høvdu heldur ikki gjørt tað av teirri einføldu orsøk, at hon er bert á føroyskum, og tí ikki kann geva einum dana, sum neyvan dugur føroyskt, fullfíggjaðar upplýsingar. Men á okkara heimasíðu stendur heilt greitt undir ársfrágreiðing fyri 2003, at tølini eru til og tey verða eisini umrødd. Á heimasíðuni stendur eisini, hvussu komast kann í samband við FF. Og hevði TV2 gjørt tað, høvdu teir fingið eina gjølla frágreiðing um tey viðurskifti, sum sendingin snúði seg um. Tá hugsað verður um, at teir hava nýtt ein mánaða at gera innslagið, er tað í hvussu er ikki tíðarneyð, sum er orsøkin til, at hetta ikki eru gjørt.

Annars framgekk eisini av greinini í Berlingske Tidende um hetta mál, at tøl vóru tøk fyri 2003.

Her skal leggjast afturat, at FF hevur **ikki** upplýst fyri TV2, at árið 2002 var enn betri fyri nótaskip enn 2001. Tað var nevniliga nakað lakari.

Tískil er her talan um eina eftirrationalisering hjá TV2, fyri ikki at tala um ósannindi, sum einki grundarlag er fyri. Samstundis er váttað, at teirra kunnleiki til føroyska fiskiveiðu er nærum eingin, og tað sama er við áhuganum fyri at seta seg inn í viðurskiftini. Hetta kann bert eggja okkum til at koma til botns í hesum máli. Fyri tað, at TV2 ikki hevur havt samband við okkum, eru ábendingar um, at teir hava havt annað samband hendan vegin, og tað er higani at tíðindi stava.

# Útbygging av digitala sendinetinum hjá Televarpinum

TÍÐINDASKRIV
*frá Televarpinum*

Síðst í august byrjar Televarpið uppá triðja byggistigið í útbyggingini av digitala sendinetinum. Fyrsta byggistigið var høvuðsstaðarøkið, annað byggistigið var Klaksvík og meginparturin av Eysturoynni. Í løtuni kunnu 65% av íbúgvunum í Føroyum móttaka signalið frá Televarpinum. Triðja byggistigið er partur av ætlanunum hjá felagnum um at røkka enn fleiri føroyingum runt landið.

Í fyrstu syftu verður sendistøð sett upp, sum bindir Hósvík upp í digitala sendinetið, sigur stjórin í Televarpinum, Laila Hentze, soleiðis at til ber at síggja Televarpið í Hósvík í september. Eisini er ætlanin at seta útgerð upp, sum røkkur longur norður í Sundalagið seinni í ár. Vestmanna og Vágarnar eru eisini partar í triðja útbyggingarstignum hjá Televarpinum.

Laila Hentze sigur, at tá ið triðja byggistigið er liðugt, fer signalið hjá Televarpinum at røkka í alt uml. 80% av íbúgvunum í Føroyum.

Sendinetið hjá Televarpinum er sera framkomið og verður nýggjasta tøknin nýtt. Hetta gevur dygdarbestu góðsku heima hjá Televarpshaldarunum. Grannalond okkara eru eisini í ferð við at seta digital sendinet upp, og Televarpið kann staðfesta, at Føroyar við digitala sendinetinum hjá Televarpinum er undangonguland á hesum øki.

Harumframt er Televarpið framvegis besti veitarin av fylgissveinasjónvarpi í Føroyum samanlíknað við aðrar útbjóðarar.

**Føroyskur tónleikur á Rás 1 hjá Televarpinum**
Televarpið hevur nú gjørt avtalu við rættindahavararnar um at spæla tónleik á Rás 1, sum er nýggja sjónvarpsrásin hjá Televarpinum.

Televarpið hevur avgjørt at spæla tónleik, sum føroyskir tónleikarar hava gjørt ella spæla, sigur Laila Hentze. Avgerðin um at senda føroyskt tónleikatilfar kemur føroyskum tónleikarum beinleiðis til góðar, tí meginparturin av upphæddini, sum Televarpið rindar til Koda, verður send aftur til tónleikararnar í Føroyum.

Laila Hentze sigur, at vit hava nógvar góðar tónleikarar í Føroyum, sum gera framúr góðan og fjølbroyttan tónleik. Tískil hevur Televarpið avgjørt, at pláss skal vera fyri einum staði, har møguleiki er at hoyra føroyskan tónleik mesta partin av døgninum. Rás 1 kann sostatt eisini brúkast sum útvarpsrás.

Á Rás 1 er eisini møguligt at kunna seg um nýggjastu tíðindi frá Portalinum og Sosialinum, dagførd veðurtíðindini frá Landsverki og valuta frá Føroya Banka. Harumframt er avtala gjørd við Sp/f INNI, so at til ber at síggja sølulistan hjá felagnum av sethúsum og øðrum ognum. Á Rás 1 verður somuleiðis øll kunning frá Televarpinum løgd út og dagførd.

Laila Hentze sigur, at Rás 1 framhaldandi verður ment, og er ætlanin at fjøltátta tilfarið enn meira eitt nú við lýsingum og føroyskt framleiddum sjónvarpstilfari.

Um fleiri upplýsingar ynskjast er møguligt at ringja til Lailu Hentze, stjóra í Televarpinum, á telefon 340 340.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Skattalætti og onnur gjøld til sjómenn

**Ellintur M. Abrahamsen**



Síðstu tíðina hevur aftur verið róð uppundir, at skattalættin til sjómenn skal burtur, ella í besta fall, so skal loftið fyri skattafrádráttinum lækka.

Tað verður tosað sum um, at tað føroyska sjófólkið hevur ov góðar sømdir. Sjálvt høgt standandi danskir politikarar halda seg framat og rópa upp um, at annaðhvørt skal skattalættin burtur, ella skal blokkurin skerjast.

Tá tað manglaði pengingur í barnsburðargrunninum, so varð beinavegin havt á lofti, at útgjaldið skuldi skerjast, og tað loftið, sum er, skal lækkast.

At lækka útgjaldið, sum sjómenn fáa úr ALS, verður ikki rópt so nógv um, men tað er av tí einføldu orsøk, at har betala sjófólk bert inn til ALS, men fáa at kalla einki út úr ALS. Ikki tí at lógin forðar teimum fyri at fáa úr ALS, tá støðan er tann, at skipið, teir sigla við, liggur vegna eitthvørt, tað veri seg brek ella eina longri umvæling/nútímansgering, og reiðarin tí við fullum rætti kann vátta, at hann einki arbeiði hevur til arbeiðsleysa sjófólkið. Nei, tað er meirilutin í stýrinum fyri ALS, sum hevur tikið tað støðu, at fiskimenn ikki skulu fáa úr kassanum. Sjálvur Hægstirættur hevur sagt, at stýrið fyri ALS eftir lógini kundi havt tikið ta mótsettu støðuna, t.v.s. sagt, at fiskimenn hava rætt til at fáa útgjald frá ALS.

Staðfestast má, at fiskimenn og teir, sum teir umboða, eru teir minni mentu, tá teir hava brúk fyri at fáa pening úr einum grunni, sum teir hava goldið til í dýrum dómi.

Ein kann spyrja seg sjálvan, um tað er rímiligt og rætt, at sjófólk ikki rinda skatt av allari sínari inntøku. Svarið vil helst bera brá av, hvørja borg ein skal verja. Tað kemst ikki uttanum, at sjófólk ikki hava somu møguleikar at brúka teir møguleikar, sum fólk á landi hava, t.d. eftirútbúgvingar, sum eru í skúlunum um kvøldið. Sjófólkið hevur heldur ikki møguleikar til at brúka so nógv av øðrum tilboðum, sum eru av bæði einum og øðrum, og ikki minst, tann missur sum sjófólk hava við ikki at vera heima hjá familjuni.

Tað verður sagt, at ein, sum hevur fortjent yvir 300.000, 400.000 ella 500.000 krónur, hann hevur ikki skattalættan fyri neyðini. Tað kann gott vera, at tað er rætt. Tey, sum halda tað, kunnu seta roknistykkið upp sjálvi. Skattaskipanin er soleiðis samansett, at tann sum fortjenar meira enn bæði 300.000, 400.000. ella 500.000 kr., hann rindar sín bróðurpart av skatti til húsarhaldið Føroyar.

Bert tað, at ein sjómaður, sum sleppur lættari í skatti, hevur betri møguleika fyri at vera meira heima, ger, at skattalætti til sjófólk er rættur.

Eg haldi tveir grundleggjandi skeivleikar vera í skattalætta til sjófólk og teir eru:

1. At skattalættin ikki er galdandi fyri øll sjófólk.
2. At ein føroyingur, sum siglir við einum fremmandum skipi, fær størri skattalætta enn ein føroyingur, sum siglir við einum føroyskum skipi.

Danskir politikarar hótta við, at verður skattalættin ikki avtikin, so skal blokkurin lækkast.

Víst verður á, at tað kann ikki vera rætt, at føroyskir fiskimenn skulu vera skattliga betur fyri enn danskir fiskimenn, og Føroyar samstundis fáa blokkstuðul úr danska ríkiskassanum. Til tað er bert at siga, at tá ein danskur politikari úttalar seg soleiðis, so má hann annaðhvørt vita ov lítið um skattaviðurskiftir hjá donskum sjófólki, ella má hann halda, at føroyingar onki vita um skattaviðurskiftini hjá donskum sjófólki, tí annars hevði hann ikki komið við sovorðnum møsni.

Við atliti til fiskimenn, so er tað kanska rætt, at føroyskir fiskimenn rinda minni skatti enn danskir fiskimenn. Hinvegin, um vit framvegis halda okkum til fiskimenn, so eru teir donsku fiskimenninir nógv betur fyri við at fáa úr arbeiðsloysiskassanum, enn hvat føroyskir fiskimenn eru.

Við atliti til handils-flotan, so vera skipari og manning á føroyskum handilsskipum skattaðir av 85% av teirra inntøku, meðan skipari og manning á donskum handilsskipum, sum eru skrásett undir DIS, ongan skatt rinda. Hesir somu eru kappingarneytar hjá føroyskum reiðaríum. Tað visti danski fólkatingslimurin kanska heldur ikki.

Niðurstøðan má tí vera, at ræðumyndin, at seta skattalættan hjá sjófólki upp ímóti blokkinum, kann ikki viga tungt. Tí skal tað vera mín áheitan á Føroya Løgting: Latið Fólkatingið lækka blokkin, áðrenn Føroya Løgting lækkar loftið fyri skattalætta og harvið hækkar skattin hjá føroyskum sjófólki!

Tá tosað verður um at lækka loftið fyri útgjaldið úr barnsburðargrunninum, so kann tað bert verða rætt, um loftið fyri inngjaldi eisini verður lækkað. Eg ivist onga løtu í, at flestu av teimum, sum eiga rætt til t.d. 35.000 úr barnsburðargrunninum, hava goldið lutfallsliga meir inn í grunnin enn tey, sum hava fingið útgoldið t.d. 20.000 kr. úr grunninum. Tí eiga tølini at verða kannað, áðrenn og um loftið fyri útgjaldinum úr barnsburðargrunninum verður lækkað, og síðan gera loft í fyri ingjaldið, so tað er samsvar millum inngjald og útgjald.

Eg veit gott, at hetta er ikki serliga samhaldsfast, men mær tykir, at tað er neyðugt at vísa á hetta, fyri at fáa tey, sum altíð fáa út í mun til tað, sum tey rinda inn, at síggja, at tær hægru inntøkurnar í flestu førum gjalda munandi meir inn í skipanina enn tær fáa útaftur.

# At hækka hámarksferðina

**Palli Dalsgaard**



At hækka hámarksferðina her hjá okkum er ein spurningur, ið er alt ov illa umhugsaður. Tað eru so mangir bilar í Føroyum í dag, at man spyr seg sjálvan, um rúm er fyri fleiri. Tað er líka mikið, nær tú fer frá húsum, so møtir tú bilum allan vegin, líkamikið hvar tú koyrir. Rætt er tað, at vit hava góðar vegir, men fólk gloyma, at vit hava ongar motorvegir, tí er koyringin her hjá okkum nógv møðsamari, enn har breiðir motorvegir eru. Vit síggja í bløðunum og hoyra fólk gremja seg um, at tey verða yvirhálað av teim flestu bilum, har ein lítil møguleiki er til tess, hóast tey halda hámarksferðina sum nú er. Tann yvirhálingin heldur ikki uppat, um markið verður hækkað, tvørturímóti.

Tað Magnus Gunnarsson segði í Útvarpinum hetta kvøldið er púra rætt. Hann fráráddi at økja um ferðina. At ferðsluvanlukkurnar eru færri nú enn tær hava verið, er bert at frøast um.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

# Eiga at samtykkja ein umhvørvispolitikk

**Samgongan eigur at leggja eitt uppskot um almennan føroyskan umhvørivispolitikk til aðalorðaskiftis á tingi í næstu tingsetu. Soleiðis ber til at fáa ein orðaðan umhvørivispolitikk samtyktan, sum allir politiskir flokkar kenna seg bundnar at**



**John Johannessen**
*tinglimur fyri Javnaðarflokkin*
*www.jokarin.com*

At landsstýrismaðurin í orkumálum hevur tikið ábyrgdina av orkuframleiðsluni og er farin í gongd við at gera eina elveitingarlóg er fyrsta fruktin av, at hendan samgongan fram um allar aðrar setti sær fyri at føra ein virknan umhvørvispolitikk.

Samgongan er samd um, at umhvørvispolitikkur og orkupolitikkur eigur at verða høgt raðfestur politikkur. Tí fylla uppgávurnar á umhvørvisøkinum meira í hesum samgonguskjalinum, enn tær hava gjørt hjá nakrari undanfarnarni samgongu.

**Samtykkja eina ætlan**
Men framvegis hava Føroyar ikki nakran beinleiðis umhvørvispolitikk samtyktan á Løgtingi, sum allir flokkar eru bundnir at. Orsøkin til hetta er helst tann, at føroyskir politikarar áður ikki hava givið sær far um, hvussu álvarsom uppgáva tað er bæði fyri nútíðina og fyri okkara eftirkomarar, at virkað verður fyri einum reinum umhvørvi.

Tí hevði tað verið eitt ógvuliga kærkomið og gott stig fyri føroyskan umhvørivspolitikk, um landsstýrismenninir í umhvørvismálum og orkumálum løgdu fyri løgtingið eitt uppskot til eina umhvørivissamtykt, sum alt løgtingið kundi tikið undir við og harvið bundið seg til.

Ein partur av innihaldinum í einari slíkari samtykt, átti at verið ein ætlan fyri, hvussu vit minka um stóru luftdálkingina, sum Føroyar nærum hava heimsmet í.

**Fyrr bumbuhóttan - nú umhvørvishóttan**
Fyri nøkrum árum síðani var kalda kríggið størsta hóttanin móti heimssamfelagnum. Tá tók Føroya Løgting fleiri ferðir støðu gjøgnum løgtingssamtyktir, millum annað um, at Føroyar skuldu vera uttanveltaðar og at Føroyar skuldu vera kjarnorkuvápnafrítt øki. Hesar samtyktir hava allir flokkara á løgtingi síðani kent seg bundnar at.

Nú er umhvørvisdálking ein tann størsta hóttanin móti heimssamfelagnum. Tí hevði tað eisini verið rætt, um Føroya Løgting nú tók støðu og kendi seg bundið at hesi støðu.

**Altjóða ábyrgd**
At virka fyri einum reinum og sunnum umhvørvi er bæði eitt gott lokalpolitiskt stig og eitt gott landspolitiskt stig, sum kann hava stóra positiva ávirkan á okkara høvuðsútflutningsvinnu, fiskivinnuna, eins væl og tað kann vera gott fyri føroyska ferðavinnu.

Men samstundis snýr ein virkin umhvørvispolitikkur seg eisini um at taka ábyrgd saman við heimssamfelagnum. At taka altjóða ábyrgd fyri at lata okkara eftirkomarar arva ein heim, har tað ber til at liva, uttan stórar og álvarsamar umhvørivishóttanir.

Samtykkja allir flokkar ein miðvísan føroyskan umhvørvispolitikk í næstu tingsetu, hava vit stigið eitt stórt fet ímóti at taka altjóða ábyrgd saman við umheiminum.